ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 13. november 2009

# Pál skal nú taka Berlin

**Um vikuskiftið skal Pál Joensen svimja World Cup í Berlin, og hetta er triðja kappingin í eina viku. Harumframt skulu Sheila Millum Garðarnar, Mona Simonsen og Pauli Øssursson Mohr eisini í hylin**




Hilmar Jan Hansen



Pál Joensen, sum hevur staðið seg framúr væl í World Cup-kappingunum í Moskva og Stockholm, kann vænta sær uppaftur harðari mótstøðu í kappingini í Berlin um vikuskiftið

Mynd: Álvur Haraldsen

Helst hendingarríkasta vikan nakrantíð hjá Páli Joensen endar við triðju World Cup-kappingini á rað, sum er í morgin og sunnudagin í Berlin. Hetta er ein kapping, sum er uppaftur sterkari enn tær í Stockholm og Moskva, og til dømis kann nevnast, at í Berlin verða ikki færri enn 78 svimjarar við, sum svimja 50 metra frísvimjing skjótari enn 50 sekund!

Við framúrskarandi úrslitunum í 1.500 metra frísvimjing og risastóru framgongdini í 400 metra frísvimjing í skjáttuni, er Pál Joensen væl fyri. Á 400 metra teininum, sum Jón Bjarnason plagar at umrøða sum »baby-teinurin«, var Pál upprunaliga tilmeldaður við einari tíð beint uttan fyri finalupláss, men við finaluplássum í bæði Stockholm og Moskva liggur hann onkrastaðni mitt í feltinum við sínum nýggju tíðarbatum.

### Nærkast ynskitíðini

Uppaftur betur stendur til á 1.500 metra teininum, har norðurlendska metið í silvursvimjingini í Stockholm og World Cup-sigurin í Moskva styrkja støðu hansara, hóast hann longu frammanundan var roknaður millum teir allarfremstu.

Í Berlin verður mótstøðan uppaftur harðari, enn hon var áðrenn, tí umframt europameistaran, Federico Colbertaldo, sum vann á honum í Stockholm, skal Pál eisini taka dystin upp við heimsmeistaran, Oussama Mellouli, og týskaran Thomas Lurz, sum er stórvinnandi havsvimjari. Og so er ikki at forgloyma »æviga kappingini« við danskaran, Mads Glæsner, ið mikukvøldið misti norðurlendska metið til Pál!

Tíðin hjá Páli í Stockholm mikukvøldið var 14 minuttir og 32,59 sekund, og sostatt nærkast hann við stórum tøkum einari ynskitíð niðan fyri 14 minuttir og 30 sekund. At fleiri sterkir svimjarar verða rundan um hann, ger kanska tann møguleikan uppaftur betri.

### Fleiri føroyingar

Umframt Pál Joensen, eru eisini tríggir aðrir føroyskir svimjarar við í World Cup-kappingini í Berlin, og teir komu allir upp á pláss í gjár, tá føroyska ferðalagið annars skifti svenska høvuðsstaðin út við tann týska, ið annars hevur verið í miðdeplinum síðstu dagarnar, nú 20 ár eru liðin, síðani múrurin millum Eystur- og Vestur-Berlin fall.

Sheila Millum Garðarnar fær mest at gera, tí hon skal svimja frísvimjing á bæði 50 og 100 metra teininum, umframt at hon skal svimja 50 metra firvaldssvimjing. Pauli Øssursson Mohr svimur 50 og 100 metra frísvimjing, og so verður Mona Simonsen at síggja í longru teinunum í frísvimjing, 400 og 800 metrum.

Stórur áhugi er fyri kappingini, sum verður í Schwimm- und Sprunghalle im Europapark við yvir 5.000 áskoðaraplássum, tí alt er útselt. Svomið verður í einum 50 metra hyli, sum er býttur sundur í tvey, so longdin verður teir obligatorisku 25 metrarnir, ið verða brúktir í World Cup-kappingunum.

# Neistin í serbiska eldin

**Tað er ein stórur biti hjá Neistanum at svølgja, nú liðið í morgin og sunnudagin skal spæla báðar dystir sínar í EHF Cup-kappingini fyri steypavinnarar í Serbia ímóti serbisku steypavinnarunum úr RK Kolubara**

Upprunaliga skuldi Neistin spæla ímóti bulgarska liðnum, Dobrudja Dobrich, men hetta var eitt mistak frá europeisku hondbóltssamgonguni, EHF, og í staðin kom Neistin inn í triðja umfari í EHF Cup-kappingini fyri steypavinnarar, og tað gav uppaftur harðari mótstøðu, sum fæst frá serbisku steypavinnarunum úr RK Kolubara. Í serbisku landskappingini eru 15 lið, og nú fimm umfør eru spæld, er RK Kolubara á odda við fullum stigatali.

Serbiska felagið var stovnað í 1960 og er sostatt næstan 30 ár yngri enn Neistin. Ikki fyrr enn eftir 1987, tá ein stór ítróttarhøll var bygd í Lazarevac, kom av álvara gongd í virksemið hjá RK Kolubara, sum síðani hevur havt stóra framgongd. Tað er í hesi høllini, at teir báðir EHF Cup-dystirnir um vikuskiftið verða spældir.

Neistamenninir fóru úr Føroyum mikudagin, og um kvøldið taldust teir millum áskoðararnar, tá FC Keypmannahavn vann 34-26 á Holstebro. Í gjáramorgunin var kósin so sett víðari ímóti Serbia, og í dag vóru bæði fyrraparts- og seinnapartsvenjingar á skránni undan teimum báðum dystunum, sum verða í morgin og sunnudagin.

Neistin, sum vann sær rættin til at spæla í EHF Cup-kappingini fyri steypavinnarar, við at vinna 27-26 á Kyndli í steypafinaluni í vár, hevði í fjør eitt framúrskarandi úrslit í EHF Cup-kappingini fyri meistarar.

Hóast Neistin tapti við 14 málum í fyrra dystinum á útivølli ímói RK Lovcen Cetinje úr Montenegro, eydnaðist í seinna dystinum, sum var á heimavølli, at vinna 33-32.

Tað verða turkisku dómararnir, Kenan Gökmen og Ayhan Gök, ið døma báðar dystirnar, og EHF-umboðsmaður á staðnum verður rumenin, Horatiu Cristian Belu. Bæði í morgin og sunnudagin byrja dystirnir klokkan 18, føroyska tíð.

hil